ítróttur

Nr. 93 • fríggjadagur • 20. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sóknast eftir plássi til írar

**Tað tykist vera fleiri írar, sum sita við atgongumerkjum til landsdystin móti Føroyum, men sum ikki hava innivist í Føroyum**

GISTINGAR
*Jákup Mørk*

Í Sosialinum í gjár hevði Kunningarstovan eina lýsing, har tey sóknaðust eftir fólki, sum kunnu hýsa írskum fótbóltsfjepparum í døgunum, 6. til 9. juni.

Orsøkin er sjálvandi fótbóltslandsdysturin hjá írum móti Føroyum. Vanliga ferðast írar í stórum tali við fótbóltslandsliðnum, og líkt er til, at dysturin hesaferð ikki verður nakað undantak.

Somikið stórur er áhugin, at tað nú stendur á at herberga øllum, sum ætlandi koma til Føroya. Her hava írar úti við 900 atgongumerki, og hetta er meira, enn gistingarvinnan í høvuðsstaðarøkinum megnar at taka. Ikki minst, tá hotellini samstundis í stóran mun eru upptikin av landsliðsleikarum, venjarum og øðrum, sum eru knýtt at slíkum ferðum.




*Kunningarstovan leitar nú eftir privat-fólki, sum kunnu hýsa nøkrum av írsku fótbóltsáskoðarunum, sum í næstum koma til Føroya*

**Plagar at ganga**

Av Kunningastovuni verður sagt, at tað í løtuni er eitt sindur trupult at siga, hvussu nógvum seingjarplássum tørvur er á. Ikki minst tí tað eisini tykist vera so, at tað í Írlandi eru fleiri fólk, sum sita við atgongumerkjum til dystin, men sum enn ikki hava bílagt sær nakra ferð til Føroya, tí tey vita ikki, hvussu vorðið er við gistingarmøguleikum. Nakað sum ger, at tørvurin á seingjarplássum væl kann økjast, so hvørt sum hesi verða fleiri í tali.

Hinvegin er heldur ikki víst, at talan verður um tann heilt stóra trupulleikan kortini. Eitt nú hava líknandi støður verið, tá skotar og týskarar hava vitjað her við sínum landsliðum, og tá hevur tað kortini borið til at herberga øllum.

- Nú heita vit so á fólk, sum kanska hava møguleika at hava einstakar áskoðarar búgvandi hesar báðar næturnar. Vit hava longu hoyrt frá nøkrum, at tey gjarna vilja hýsa einum, tveimum og trimum, og tað hevur ofta víst seg, at føroyska hjálpsemið er stórt í so máta, verður sagt av Kunningarstovuni.

- Tað er jú heldur ikki øll verðin, sum biðið verður um. Vanliga hava fótbóltsáskoðarar so ikki givið okkum trupulleikar av nøkrum slag. Tað einasta, sum tey vilja hava, er eitt pláss at sova í, og tá talan bara er um tvær nætur, so vóna vit, a tað ber til at fáa fólk at hýsa nøkrum av hesum, verður sagt at enda.

## Fótbóltsskúlarnir byrja aftur

Aftur í ár fer Fótbóltssambandið at skipa fyri fótbóltsskúlum kring landið. Í ár verða skúlarnir tríggir í tali, og verða hesir í Sandavági, í Havn og á Toftum.

Skúlarnir í Sandavági og í Havn verða hildnir 24. og 25. juni, meðan tann á Toftum verður hildin 1. og 2. juli.

Sum vant, so er talan um avmarkað tal av luttakarum. FSF heitir tí á tey, sum ætla sær at taka lut, um at gera skjótt av við tilmeldingini. Evstmark fyri tekngin er annars 10. juni, men eru skúlarnir fullsettir áðrenn hetta, verður kortini ikki tikið ímóti nýggjum næmingum.

-jm

## HB-NSÍ mánakvøldið

Týskvøldið varð lutur kastaður um, hvørt tað skuldu verða B36 ella HB, sum skuldu spæla sunnudagin komandi. Hetta gjørdist neyðugt, tá fótbóltskappingin av misgávum varð løgd soleiðis, at bæði havnarfeløgini skuldu hava heimavøll samstundis. Og hóast roynt varð at broyta hetta, so vísti tað seg ikki at hjálpa stórvegis.

Í lutakastinum, sum gekk fyri seg í Útvarpinum týskvøldið, varð úrslitið so, at B36 og Skála spæla sunnudagin, og at HB og NSÍ spæla mánakvøldið

-jm

# Døllarí í dómsnevndini

**Dómsnevndin hjá FSF hevur nú í ein mánaða bølt yvir máli, sum eftir røttum skuldi tikið í mesta lagi 10 dagar at avgreitt**

KÆRUVIÐGERÐ
*Jákup Mørk*

Tann 15. apríl sendi Royn eina kæru til dómsnevndina hjá FSF. Kæran snúi seg um dystin millum Royn og B71 í kappingini um FSF-steypið, har Royn hevði kært B71 fyri at nýta spælara, sum ikki stóð á dómaraseðlinum.

Úrskuðrurin hjá kappingarnevndini í málinum varð, at sandoyingarnir fingu eina bót fyri óskMaría, men at teir ikki vóru dømdir at tapa dystin. Ein úrskurður, sum hvalbingar ikki vóru nøgdir um, og sum teir tí kærdu til dómsnevndina.

Men síðani er ikki hent nakað sum helst í málinum. Sambært reglugerðini fyri dómsnevndina, so eigur niðurstøða at verða gjørd í málinum innan 10 dagar eftir, at alt viðkomandi tilfar er fingið til vega. Og staðfest verður eisini, at hetta »viðkomandi tilfar« skal fáast til vega sum skjótast.

**Handfaringin er prinsipiel**

Og tað er einki at siga til, um hvalbingar eru ónøgdir um viðgerðina, sum málið hevur fingið.

Hjá Royn er talan nevnliga um dyst, ið kann vera avgerandi fyri, hvørt liðið skuldi hava møguleika fyri víðari luttøku í kappingini um FSF-steypið. Fær Royn viðhald í kæruni, broytist støðan í bólki 1 soleiðis, at Royn, LÍF og B71 øll hava sama stigatal. Eisini í innanhýsis uppgerðunum vilja liðini hava sama stigatal, men málmunrin hjá Royn vil tó verða tann lakasti. Í førum, har kærur elva til slíka støðu, hevur FSF tó ikki nakran greiðan politikk, og tí er ikki óhugsandi, at kappingarnevndin tá skuldi tikið støðu til, hvat skal henda.

Men hóast kæran varð send dómsnevndini tann 15. apríl, so hevur Royn tó einki hoyrt aftur í málinum. Dómsnevndin var annars saman um vikuskiftið, 23. – 24. apríl, men ta ferðina vórðu einans málini viðvíkjandi kærunum hjá KÍ og B36 viðgjørd. Tvær kærur, sum annars vórðu lætnar dómsnevndini samstundis, sum kæran hjá Royn varð latin.

Spurningurin er so, hvørja lagnu málið hjá Royn fær. Tað er neyvan haldbært, at dómsnevndin als ikki viðgerð málið, og hóast dómsnevndin sjálvandi kann staðfesta avgerðina hjá kappingarnevndini, so má handfaringin av málinum sigast at hava stóran prinsipiellan týdning. Tí hvussu leingi kann bíðar eftir avgerðum, sum møguliga kunnu fáa avgerandi ávirkan á lands- og/ella steypakapping.

Vit hava fleiri ferðir roynt at fáa viðmerkingar frá formanninum í dómsnevndini, Petur Even Djurhuus, men higartil hevur hesin ikki verið at hitta.

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!